# Útgreining av broyting í grein 8 stk. 2

Kappingarreglum fyri fótbólt - februar 2026

Frá og við kappingarárinum 2026 er bert loyvt at flyta **tríggjar leikarar, sum eru fyltir 21 ár** 1. januar í kappingarárinum, úr hægri vaksnamannadeild niður í lægri vaksnamannadeild.

Hetta er galdandi fyri bæði menn og kvinnur.

Tað er dómaraseðilin í hægri deild (ella í seinasta leikta dystinum í hægri deild), sum avger, hvørjir telja sum eykaleikarar.

Leikarar undir 21 ár eru teir, sum fylla 21 ár í kappingarárinum ella eru yngri.

**Hvat var galdandi áður?**

Áður kundi allur bonkurin í hægri deild spæla í lægri deild sama leikdag. Harumframt kundu allir leikarar undir 21 ár spæla við báðum deildum sama leikdag, óansæð um teir byrjaðu inni ella vóru eykaleikarar.

**Hvat er galdandi nú?**

- Í mesta lagi 3 eykaleikarar, sum eru fyltir 21 ár 1. januar, kunnu flyta niður í lægri deild at spæla.
- Tað hevur ongan týdning, um eykaleikarin kemur inn á vøllin ella ikki.
- Leikarar undir 21 ár eru ikki fevndir av avmarkingini.
- Um fleiri enn 3 leikarar, sum ikki koma undir serregluna fyri leikarar undir 21 ár, flyta niður í lægri deild at spæla, verður tað mett sum nýtsla av ólógligum leikarum sambært kappingarreglunum.

**Reglan í praksis**

1) <u>Tá hægra og lægra deildin spæla sama leikdag</u>
    - Í mesta lagi 3 eykaleikarar, sum eru fyltir 21 ár 1. januar kunnu flyta niður í deild at spæla
    - Allir leikarar undir 21 ár kunnu flyta niður í deild, óansæð um teir eru byrjaðir inni ella sum eykaleikarar í hægri deild

2) <u>Tá hægra deildin spælir ein leikdag og lægra deildin hevur frí</u>

- Avmarkingin um 3 eykaleikarar fær ikki týdning henda dag, tí lægra deildin ikki spælir
- Tað kann veljast millum allar tøkar leikarar til hægri deildina.

3) <u>Tá lægra deildin spælir ein leikdag og hægra deildin hevur frí</u>
   - Tá verður hugt at leikaralistanum seinasta leikta dyst í hægri deild
   - Í mesta lagi 3 av teimum eykaleikarum (sum eru fyltir 21 ár 1. januar) kunnu flyta niður. Tað hevur ikki týdning um leikararnir koma inn ella ikki, teir skulu vera skrásettir sum eykaleikarar á dómaraseðlinum.
   - Leikarar undir 21 ár kunnu framvegis flyta niður uttan avmarking
   - Leikarar, sum ikki vóru skrásettir á seinasta leikaralista hjá hægri deild, kunnu spæla við lægri deild, um teir annars eru lógligir.

# GREIN 8 – dømir

Flyting av eykaleikarum millum deildir

Í dømunum niðanfyri eru leikararnir merktir soleiðis:

 = leikari, sum er fyltur 21 ár 1. januar í kappingarárinum

 = leikari, sum ikki er fyltur 21 ár 1. januar í kappingarárinum

**<u>Dømi 1</u>**

**5 leikarar yvir 21 ár og 2 leikarar undir 21 ár á bonkinum**

Meistaradeild (eykaleikarar):



1. deild spælir sama leikdag

Loyvt:



Ikki loyvt:

🔴 🔴 (nr. 4 og 5)

➡️ Max 3 leikarar yvir 21 ár

**<u>Dømi 2</u>**

**Bert 1 leikari yvir 21 ár á bonkinum**

Meistaradeild (eykaleikarar):

🔴

🟢 🟢 🟢 🟢

Loyvt í 1. deild:

🔴

🟢 🟢 🟢 🟢

➡️ Ongin trupulleiki – allir leikararnir kunnu spæla

**<u>Dømi 3</u>**

**1 leikari byrjaði inni og 3 á bonkinum**

Meistaradeild:

🔴 (byrjar inni)

🔴 🔴 🔴 (bonkur)

1. deild sama leikdag

Loyvt:

🔴 🔴 🔴 (frá bonkinum)

❌ 🔴 Leikarin, sum byrjar inni, ikki loyvdur

**<u>Dømi 4</u>**

**Hægri deild hevur frí. Hægra og lægra deildin spæla ikki sama leikdag**

Sunnudag: Meistaradeildin spælir
Mikudag: 1. deild spælir

Eykaleikarar í seinasta dysti hjá Meistaradeildini:

🔴 🔴 🔴 🔴
🟢 🟢

Loyvt í 1. deild:

🔴 🔴 🔴
🟢 🟢

➡️ Max 3 🔴 frá dómaraseðlinum í seinasta dystinum kunnu spæla
Minuttir hava ongan týdning – eykaleikararnir á dómaraseðlinum telja.
❌ Ein fjórði 🔴 er ikki loyvdur

**<u>Dømi 5</u>**

**3 leikarar, sum eru fyltir 21 ár 1. januar og 3 yngri vóru á bonkinum**

**Meistaradeild (bonkur):**

🔴 🔴 🔴
🟢 🟢 🟢

➡️ Allir kunnu spæla

**<u>Dømi 6</u>**

**2 eldri enn 21 ár koma inn á vøllin**

**Meistaradeild:**

🔴 🔴 🔴 🔴 (bonkur)
2 av teimum koma inn

➡️ Tað broytir einki

**1. deild:**

Max 3 🔴 🔴 🔴

Minuttir hava ongan týdning – eykaleikarnar á dómaraseðilinum telja.

❌ Ein fjórði 🔴 er ikki loyvdur